

www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 08 - 2012

# Obama umhugsar at trýsta oljuprísin niður

Teir høgu olju- og benzinprísirnir hava elvt til misnøgd millum amerikanarar, sum eru vanir við bíliga olju og bíligt benzin, og nú ljóðar, at Barack Obama, forseti, umhugsar at koyra ein part av teirri amerikonsku oljugoymsluni út á marknaðin fyri á tann hátt at trýsta prísin niður. Hava nógv á goymslu Tíðindastovan Reuters sigur fá ónevndum keldum, at stjórnin í Washington fer at halda eygað við marknaðinum tær næstu vikurnar fyri at vita, um oljuprísurin fellir aftan á tann 3. september, sum hann søguliga sæð plagar at gera. Hendir tað ikki, er Obama til reiðar at seta á goymslurnar. USA hevur heimsins størstu oljugoymslu til neyðstøðu. Landið hevur pláss fyri 727 milliónum tunnum, og sambært einum yvirliti hjá stjórnini eru 695,9 milliónir tunnur á goymslu nú. Tað ljóðar ógvusligt í okkara oyrum, men her skal havast í huga, at amerikanararnir brúka 19,5 milliónir tunnur av olju um dagin. Tær ónevndu keldurnar siga fyri Reuters, at tað er tvinnar orsøkir, til at Obama-stjórnin umhgsar at skrúva kranarnar á landsins goymslum frá. Onnur er, at tann høgi oljuprísurin darvar amerikanska búskapin, og hin er, at hann kemur Iran væl við. Tí tess meiri Iran fær fyri ta oljuna, sum landið framvegis útflytir, tess minni ávirkan hava tiltøkini, sum USA og ES hava sett í verk ímóti landinum. Sambært keldunum hevur Obama sagt, at hann fer at kunna Bretland, Frakland, Týskland og hini londini í IEA, áðrenn hann tekur nakra avgerð um at seta á oljugoymslurnar. Riggaði í fjør Síðani 1985 hava amerikanskar stjórnir átta ferðir sett á landsins oljugoymslur. Seinastu ferð var í 2011, tá tað bleiv gjørt fyri at tálma príshækkingini, sum stóðst av uppreistrinum í Libya. Tá lótu amerikanararnir 60 milliónir tunnur úr goymslunum fara út á marknaðin, og tað gjørdi, at oljuprísurin fell úr 114 í 107 dollarar fyri tunnuna.